

*Helgi Hjørvar úr íslandi, Kristi Bergstrø úr Noreg, Tove Søvndahl úr Grønlandi og Jørgen Niclasen úr Føroyum.*

**» Tað, sum ES vil hava frá okkum, er tað, sum vit ikki vilja lata teimum. Vit høvdu verðið noydd at latið okkara tilfeingi og okkara fólkaræði uppí hendurnar á ES, um vit blivu limir, og tað hvørki kunnu ella vilja vit.**

JØRGEN NICLASEN

### Morten Messerschmidt, Danmark:

# Danmark er brúgvin millum Føroyar og Brússel

**- ES er ikki ein felagskapur fyri smáar tjóðir. Tit verða etin upp og hvørva, um tit fara uppí. Samstarvið í norðurlondum er passé, og Danmark er tí tykkara einasti møguleiki at vera við, har tað hendir. Danmark er besta brúgvin millum Føroyar og Brússel, segði Morten Messerschmidt frá Dansk Folkeparti, sum umboðar Danmark í ES-parlamentinum**



*Morten Messerschmidt frá Dansk Folkeparti, umboðar Danmark í ES-parlamentinum*

Morten Messerschmidt vil ikki mæla londum, sum vilja halda fram við sínum serligu siðum, til dømis hvalaveiðu, at koma við í ES.

– ES er ikki ein felagsskapur, sum tekur hædd fyri ymiskleika. Tað er ein trumla, sum kloynir alt, sum er øðrvísi, so at ymiskleikin hvørvur.

Messerschmidt heldur, at ES hevur ein ideologiskan dreym um at skapa eina tætta unión, men tað er rein utopi. Veruleikin er, at man er noyddur at virða ymiskleikan, um man skal hava nakran møguleika fyri samstarvi.

– Sum er, víkir ES frá týdningarmiklu siðunum um, at man eigur at virða hvønnannan. Tað hevur við sær, at tit ongan kjans hava at yvirliva í ES.

– Ein annar trupulleiki við ES er, at tað er so fjart frá veljarunum. Tað er ein hugmynd, sum fólkið ikki kann fyrihalda seg til. Allir embætismenninir, sum taka størstu avgerðirnar innan ES, hava aldrin so mikið sum sæð ein veljara. Tí kunnu teir loyva sær at trumla.

– Fleiri hava tosað um økt norðurlendskt samstarv, men tað er ein farin tíð. Vit mugu fyrihalda okkum til nútíðina, og tá slepst ikki uttanum ES. Men skulu tit hava nakran møguleika fyri at vera við, har avgerðirnar verða tiknar, so mugu tit umvegis Danmark. Vit eru brúgvin frá Føroyum og Grønlandi og niður til Brússel.

Hann viðgekk, at tað kann vera ein trupul støða, eftirsum danir ikki eru samdir við øllum, sum vit gera, til dømis grindadrápi, men hóast tað, so hava vit ein møguleika at fáa ting á dagsskránna.

– Vit umrøða hvalaveiðu og grindadráp á Christiansborg, og tað merkir, at tit hava týdning og ávirkan, helt Messerschmidt.

### Kirsti Bergstrø, Noreg:

# Alternativið til ES er at ráða sær sjálvum

**So bersøgin var Kirsti Bergstrø úr Norska felagskapinum "Nei til EU", tá hon tók orðið á Studentadegnum í Keypmannahavn. – Londunum í ES mangla matvøru, frumevni og energi, og tað vildi verið burturvið hjá okkum at latið teimum tað og samstundis mist okkara sjálvræði, helt hon.**

Tað var greitt frá fyrstu orðunum, at Kirsti Bergstrø ikki heldur nógv um ES-samveldið. Hon var uppstillað til norska valið, gjørdi eitt framúr gott val, men varð tó júst ov stutt til at koma inn. Nú er hon forkvinna í felagskapinum "Nei til EU".

Og at hon brennir fyri at tosa ímóti ES limaskapi, er eingin ivi um.

– Sjálvandi vil ES hava fatur í londunum í Norðuratlantshavi. Vit hava fisk, orku og frumevni, sum felagsskapurin heldur enn fegin vil hava hendur á. Tað er jú eingin loyna, at høvini í Suðurevropa mestsum eru tóm, vísti hon á. – Høvini eru ovfiskað, og nú noyðast tey at troyta nýggjar leiðir fyri at fáa fisk. Men fara vit uppí ES, so missa vit rættindini til okkara øki.

### ES krevur nógv

Kirsti Bergstrø vísti á, at heitið "samveldið" er rættiliga misvísandi. Tí, sum hon segði, so er ES í grundini ein bólkur av londum, sum fyrst og fremst hugsa um seg sjálvi. Sum royna at skava til sín og fáa sum mest í egnan part. Av øllum londunum í ES er meginparturin í Suðurevropa. Og tey suðurevropeisku londini standa saman og arbeiða fyri teirra øki. Tey fara aldrin at leggja nakað serligt í okkum her norðuri í Atlantshavinum eftir, at tey hava fingið hendur á okkara ríkidømi, helt Kirsti Bergstrø. Noreg er framvegis uttanfyri ES-samveldið, men um Íslendingar lima seg inn í felagsskapin, so fer tað uttan iva at ávirka støðuna, sum norðmenn hava. Men hesum stúrdi Kirsti Bergstrø als ikki fyri.

### Ísland má ansa sær

– Ísland vil sleppa inn í ES, men teir vilja fyrst hava eina seravtalu í lag um fiskin undir Íslandi. Og tað vænti eg ikki, at teir fáa. Noreg hevur verið í samráðingum við ES, og vit kravdu eisini seravtalur á t.d. fiskivinnuøkinum. Men tað fingu vit ikki.

– Tilboðið frá ES var ein long niðurlagingartíð, har vit so líðandi mistu meiri og meiri ræði á okkara fiskivinnupolitikki. Og tað fer uttan iva at verða tað sama hjá Íslandi.

Londini sunnanfyri hava so alstóran tørv á fiski, at tey kunnu ikki ganga við til seravtalur. Fer Ísland inn í ES, missa teir tí við tíðini øll rættindi, og tað vænti eg ikki, at íslendingar góðtaka. Tí stúri eg ikki fyri, hvat skal henda við Noreg, um Ísland fer inn í ES. Tí tað vænti eg ikki, at teir fara.

Bergstrø tosaði eisini um EBS avtaluna, og hon helt ikki, at Noreg hevur havt góðar royndir av henni. – Vit hava júst gjørt eina stóra kanning í Noreg, og eg vil viðmæla tykkum at lesa tað úrslitið, áðrenn tit taka nakra avgerð um EBS.

– Skalt tú vera við í ES ella EBS so krevst, at tú frásigur tær rættin at ráða í egnum landi. So verða tað í staðin 27 lond í Evropa, sum skulu gera av, hvat skal henda við til dømis rávøruni.

– Tað er í grundini bert ein einasti felagsskapur, har tú ikki skalt avhenda rættindini at ráða í egnum landi, og tað er EFTA. Og tá fólk siga, at ES er framtíðin, og at tað einki veruligt alternativ er til ES-samveldið, so sigi eg: jú, tað er tað. Alternativið er at ráða sær sjálvum!

## European Free Trade Association – EFTA

- EFTA er ein fríhandilsavtala, sum í løtuni er galdandi ímillum 4 lond: Ísland, Noreg, Lichtenstein og Sveits.
- EFTA varð stovnað í 1960, og var upprunaliga mótsvarið til EF, sum varð stovnað í 1957.
- EFTA hevur havt nógv fleiri limalond, t.d. Stóra Bretland, Danmark, Frakland, Finland, Svøríki, Eysturríki og Portugal, men so við og við eru tey flestu londini farin yvir til ES og úr EFTA.
- Føroyingar hava kannað møguleikan fyri EFTA limaskapi, men treytin fyri upptøku er, at man er eitt sjálvstøðugt land.
- So leingi vit hoyra til Danmark, kunnu vit ikki gerast limur í EFTA, tí so skal Danmark umboða okkum. Eftirsum Danmark er limur í ES, kann hetta ikki lata seg gera, tí Danmark í so fall skuldi samráðst við seg sjálvt, tá EFTA og ES samráðast.
- Óvíst er hvat hendir, um Ísland fer upp í ES